gult cyan magenta svart



# Viðførið varð gíðslatikið

**Forðingarnar vóru nógvar, tá føroyski landsliðshópurin sunnudagin skuldi ferðast úr Luksemburg til Moskva**

LANDSDYSTUR
*Álvur Haraldsen/Jákup Mørk úr Moskva*

Tað varð ein drúgv ferð, sum landsliðið hevði fyri framman, tá teir tíðliga sunnumorgunin settu kósina móti russiska høvuðsstaðnum, Moskva.

Longu klokkan fimm á morgni skuldu spælararnir sessast í bussinum, sum skuldi føra teir úr Luksemburg til Bruxelles. Har skuldi nærum alt fyri eitt kekkast inn til Moskva, og so var annars bara at bíða. Eftir at flogfarið fyrst varð seinkað, orsakað av manglandi visum hjá Súna Olsen, varð flogið í tríggjar tímar til Moskva. Lítið mundu leikararnir tá grunað, at teir tá áttu drúgvasta partin av ferðini eftir.

## Gjølligt eftirlit

Flestir mundu teir vóna, at teir skjótt fóru at fáa eina tiltrongda hvíld, men tað skuldu ganga nógvir tímar, áðrenn fleiri teirra sóu hotell sengurnar á størsta gistingarhúsinum í Europa, hotel Rossija.

Fyri føroyingar, sum aloftast eru vanir við at spáka sær ígjøgnum passeftirlitið í Kastrup við einsamalla orðinum »Føroyar«, mundi tað kennast møðsamt at standa í bíðirøð, meðan ein og ein leikari spakuliga fóru ígjøgnum eftirlitið, har gomlu passmyndinar og núverandi andlitini vórðu samanborin. Fyri summi mundi tað tykjast sum ein sonn uppvísing í eysturеuropeiska umsitingarvaldinum, sum enn hevur góðar dagar, hóast jarntjaldið fyri eystan hevur verið burturi í góð 10 ár.

## Viðførið varð tikið

Eftir at teir soleiðis langt um leingi vóru komnir fram til rúmið, har viðførið skuldi rulla eftir transportbandinum, men tá kom so næsti trupulleikin. Tá alt varð gjørt upp vísti tað seg nevnliga, at tríggjar taskur og 14 kassar við viðføri hjá landsliðnum ikki vóru komin vegin farm.

Tað tók eisini sína tíð at finna út av, hvar alt hetta var horvið. Alt varð funnið í einum høli á flogvøllinum, men fyri at fáa hetta út, var neyðugt at leggja nakrar dollarar á diskin.



*Risastóra hotellið við 3.100 kømurum er staðið, har landsliðsleikararnir skulu búgva fram til hósmorgunin*

## Risa stórt hotell

Eftir tveir langar tímar vóru lidnir, kundi leiðin so endiliga leggjast frá flogvøllinum, varð í bussi koyrt til gistingarhúsið. Eftir at hava koyrt á góðan hálvan tíma fram við nógvu stalinistisku monumentunum, var hotellið í eygsjón, men heldur ikki hetta var løtuverk at avgreiða. Fyrst og fremst tí tað mundi taka úti við hálvan annan tíma at fáa leikarar, leiðarar og fjølmiðlafólk bookað inn, men so sanniliga eisini orsakað av støddini á hotellinum.

Tað er nevnliga ikki bara at siga tað, at skula finna runt inni á størsta hotellinum í Europa. Tað gingu nevnliga góðir tríggir tímar, til allir leikarar høvdu funnið út av, hvat kamar teir skuldu hava á risastóra hotellinum, sum hevur ikki færri enn 3.100 kømur, og sum at kalla er bygt í trimum risastórum blokkum.

Sostatt gingu sjey og ein hálvur tími frá teirri løtu at flogfarið setti seg, til moyru spælararnir høvdu funnið seg til sættis á gistingarhúsinum, har Reyða torgið liggur framman fyri høvuðsdyrnar.

# Súni mátti bíða



**Væntandi visum var orsøkin til, at Súni Olsen ikki slapp við liðfeløgunum til Moskva**

LANDSDYSTUR
*Álvur Haraldsen/Jákup Mørk úr Moskva*

Tað var ikki alt, sum gekk eftir ætlan, tá føroyska ferðalagið klokkan 9.25, lokala tíð, skuldi taka seinastu fetini inn í flogfarið, sum skuldi taka teir longu leiðina til Moskva.

Í passeftirlitinum á flogvøllinum í Brüxelles varð Súni Olsen steðgaður, tí hann ikki hevði neyðuga visumið fyri at sleppa inn til Russlands.

## Vistu um trupulleikan

Leiðarar í landsliðshópinum vóru væl greiðir um trupulleikan, sum var íkomin, tí Súni varð úttikin eftir sjúku hjá Una Arge, og at hann tískil ikki hevði havt neyðugu tíðina til at fáa innferðarloyvið í rættlag.

Jens Erik Magnussen, sum er annar av ferðaleiðarunum hjá landsliðnum, segði við Sosialin, at teir sjálvandi vóru greiðir um trupulleikan.

- Trupulleikin er sjálvandi tann, at innferðarloyvini vórðu útstkrivað í Keypmannahavn undan fráferðini, og at Súni eftirfylgjandi varð úttikin til hópin.

- Eg hevði tó fingið at vita, at tað helst ikki fór at gerast nakar trupulleiki hesum viðvíkjandi í Belgia, men at vit kanska høvdu fingið ein trupulleika í Moskva. Hinvegin visti eg, at um vit komu til Moskva, so hevði borið til at fingið fólk á staðnum at hjálpt okkum.

Sum tú sært, so slapp Súni tó ikki við flúgvarunum, og tað var eisini orsøkin til seinkanina her niðri. Viðførið hjá Súni var nevnliga kekkað inn, og tí mátti hetta takast úr aftur flogfarinum, áðrenn farast kundi.

## Verður helst við

Trupulleikin var tó ikki størri enn sum so, at við evstamark okkara varð framvegis roknað við, at Súni fór at koma til Moskva undan landsdystinum.

Jens Erik Magnussen greiðir frá, at Mortan Poulsen, sum eisini er ferðaleiðari á ferðini var eftir í Brüxelles saman við Súna, og at teir báðir ætlandi skuldu koma til Moskva tíðliga mánamorgunin.

## Ikki fyrstu ferð

Annars er hetta ikki fyrstu ferð, at Jens Erik hevur havt trupulleikar av at ferðast til Moskva. Eina ferð áður hevur landsliðið verið at kalla fast í russiska høvuðsstaðnum.

Tað ferðina greiðir Jens Erik frá, at tað varð lovað teimum, at innferðarloyvini skuldu liggja klár á flogvøllinum, men hetta varð kortini av ongum. Tískil høvdu teir hesa ferð gjørt alt umvegis russisku umboðsstovuna í Keypmannahavn, men at sjúka so ger um seg, fekk Fótbóltssambandi so ikki vart seg fyri.

*Súni Olsen slapp ikki við landsliðnum til Moskva, men noyddist ístaðin at gista í belgiska høvuðsstaðnum saman við Mortani Poulsen, ferðaleiðara*



